

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 03 - 2013

# Bretsk oljuvinna tørvar 34.000 fólk komandi tvey árini

Brúk er fyri ikki minni enn 34.000 fólkum at arbeiða í bretsku olju- og gassvinnuni komandi tvey árini. Væntandi fara íløgurnar í tí skjótt vaksandi ídnaðinum at seta met í 2013 við 100 mia. kr. Eftirspurningur í grannalondum Vaksandi olju- og gassvinnan í okkara grannalondum, Noregi, Bretlandi og Danmark skríggjar eftir fólki. Og seinastu tíðina hava ógvuslig tøl verið frammi í miðlunum um, hvussu nógv túsundtals størv eru og verða leys at søkja í hesum londum. Og eftir øllum at døma er tað Bretland, sum hevur størsta tørvin á arbeiðsfólki. Ein uppgerð frá Lloyd´s Banking vísir, at brúk verður fyri 34.000 fólkum aftrat í bretsku olju- og gassvinnuni. Hetta kemur í kjalarvørrinum á einum veruligum boomi í vinnuni eftir, at myndugleikarnir í London hava lækkað skattin á nógvum av stóru útbyggingunum, eitt nú vestan fyri Hetland og her eisini tætt upp at føroyska markinum. Íløguhugurin í vinnuni er vaksin sera nógv og verða tøl sum ein billion kr. ella 1000 mia. kr. nevnd í íløgum mongu komandi árini. Av hesum 100 milliardir bara í ár. Kanningin er gjørd millum 100 bretskar fyritøkur, har 77% av teimum ætla at vaksa í 2013 og 2014. Rigzone skrivar, at tað í nógvum førum snýr seg um at fáa fatur á júst teimum røttu fólkunum til nýggju størvini. Bæði Bretland og Noreg hava seinastu árini havt torført at finna fólk við teimum røttu útbúgvingunum til at arbeiða í mennandi olju- og gassvinnunum. Eisini í Danmark er tørvurin á væl útbúnum fólkum stórur. Eitt nú er Maersk Oil farið undir eina stóra kampanju at finna fleiri 1000 verfrøðingar til framtíðar arbeiðsuppgávur. Í dag síggja vit eisini, at ein partur av føroysku arbeiðsmegini roynir at gera sær dælt av eftirspurninginum eftir fólki í oljuvinnuni. Eitt nú hava fyritøkurnar PAM Offshore í Havn og Faroe Offshore á Skála fleiri hundrað føroyskar handverkarar til arbeiðis í norsku oljuvinnuni.